ítróttur

Nr. 55 • Fríggjadagur • 17. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Finalan tykist víðopin

**Tvær ferðir á rað hava kvinnurnar hjá Neistanum bast reyðu favrittunum úr Klaksvík, sum tí als ikki eru eins sjálvsagdir favorittar, sum tær hava verið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sunnudagin fyrsta av tveimum – og kanska trimum – FM-finalum í kvinnuhondbólti spæld.

Soleiðis sum gongdin hevur verið hetta árið, er mest sum sjálvsagt, at dysturin stendur millum Neistan og Stjørnuna. Júst somu lið, sum hittust í steypafinaluni fyri góðum mánaði síðani.

### Ikki eins greitt

Í mun til ta ferðina, so er favoritt-leikluturin hjá Stjørnuni tó als ikki so greiður, sum hann var undan steypafinaluni.

Partvíst, so prógvaði Neistin í finaludystinum, at tað eisini ber til at vinna á Stjørnuni, tá talan er um týdningarmiklan dyst. Og partvíst, so hevur Stjørnan meira ella minni verið rakt av einum ógvusligum niðurtúri síðani.

Tann niðurtúrurin tóktist tó at enda, tá hálvfinalurnar móti VB vórðu spældar. Við tveimum knúsandi sigrum staðfestu stjørnurnar her, at tær so ruddiliga áttu finaluplássið uppiborið, og kanska var tað júst hendan succés-upplivingin, sum skuldi til, fyri at fáa liðið upp aftur. Og tað er eisini vert at hava í huga, at liðið »hevði ráð« til niðurtúrin, tí dystirnir í endaspælinum ikki høvdu so nógv upp á seg, tá liðið kortini var tryggjað hálvfinalupláss.



*Sunnudagin fara Neistin og Stjørnan undir fyrsta partin av stríðnum, sum skal gera av, hvør skal fáa rættin at rópa seg føroyameistara í kvinnuhondbólti 2006*

### Fá ivamál

Úr báðum legunum ljóðar, at so gott sum hvør tann einasta av spælarunum er til reiðar at fara á vøllin sunnudagin.

Einasta ivamálið tykist vera Annika Thomsen hjá Neistanum. Hon fekk ein snudd í seinnu hálvfinaluni móti Kyndli, og tí er sterki skotarmurin enn ikki 100%. Men roknað verður tó við, at hon verður við sunnudagin, kortini.

Hartil er eisini sannlíkt, at Birita Wardum kemur heima at hjálpa Neistanum, eins og hon gjørdi tað í steypafinaluni. Ta ferðina gjørdi hon góðan mun – serstakliga í verjupartinum – og vónin er sjálvandi, at tað aftur verður støðan hesaferð.

Hjá Stjørnuni verður ikki tosað um nakað ivamál. Allar tær, sum í ár hava verið á liðnum, eru tøkar, og tað verða so eisini tær, sum skulu manna liðið sunnudagin, skilst.

---

# Greiðir leiklutir í fremstu formel 1 liðunum

**Hóast summi formel 1 lið ikki ynskja at taka nakran ávísan koyrara framum, so tykist longu aftan á fyrstu koyringina at vera greiður munur á koyrarunum í øllum teimum fremstu liðunum.**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Stríðið millum liðfelagar í formel 1 kann vera hart. Men nøkur lið velja at hava eina greiða støðu, har annar koyrarin er høvuðs prioritetur hjá liðnum, onnur velja heilt greitt ikki at gera mun.

Eingin koyrari hevur ivaleyst hug til at vera hjálparkoyrari. Hetta var eisini beinleiðis orsøkin til, at Rubens Barrichello fór til Honda í ár. Hann vildi ikki longur standa í skugganum av Michael Schumacher, men vildi sjálvur vinna.

Í koyringini í seinastu viku komu greiðar ábendingar um, hvør er høvuðskoyrari og hvør er hjálparkoyrari í fýra teimum fremstu liðunum.

Í fyrstu koyringni fyri Ferrari gjørdi Felipe Massa eina koyrivillu og aftan á ein sera óheppnan pittsteðg, endaði hann aftastur og kláraði ongantíð at koma fyri seg. Hetta hóast hann sat í sama bili sum Schumacher, ið bardist um fremsta plassið.

Hjá Renault var støðan tann sama. Fernando Alonso vann koyringina meðan Giancarlo Fisichella ongantíð veruliga megnaði at avbjóða, áðrenn bilurin steðgaði upp við tøkniligum trupulleikum.

Hjá McLaren-Mercedes bardi Kimi Räikkönen seg av aftasta plássi fram til triðfremst, meðan liðfelagin Juan Pablo Montoya, ið byrjaði í fimtu byrjunarstøðu, eisini endaði fimtur.

Rubens Barrichello kappaðist ikki um sigrar í Bahrain. Liðfelagin Jenson Button hevði trupulleikar við koblingini í byrjanini. Hann var tó skjótur uppi á triðja plássi aftur. M.a. yvirhálaði hann Barrichello. Barrichello byrjaði nummar seks, men fekk skjótt trupulleikar við girunum og endaði á fimtanda plássi.

Enn er bert ein formel 1 koyring koyrd, og tí er einki avgjørt enn.Í fjør vann Fisichella fyrstu koyringina, men stutt eftir var hann ein greiður hjálparkoyrari hjá Renault.

---

## Helgi steðgaður í snar

Helgi Dam Ziska var í vikuni við í eini kapping í snartalvi í Reykjavík. Hann vann seg fram millum 64 teir bestu í kappingini – eini 200 spælarar vóru við – men har varð hann steðgaður av ísraelska stórmeistaranum Sergey Erenburg. Helgi kann tó fegnast um, at hann nú er tikin út til OL-landsliðið, sum fer til Torino. Landsliðið verður mannað við John Arna Nilssen, Martini Poulsen, John Rødgaard, Helga Dam Ziska og Hans Kristiani Simonsen.

---

## FSV nýggja heimasíðu

Á midnátt í kvøld verður nýggja heimasíðan hjá FS Vágum 2004 løgd á internetið. Felagið, sum ætlar sær upp í bestu fótbóltsdeildina aftur, hevur havt eina heimasíðu í nøkur ár, men nú vrður nýggj síða gjørd, sum bæði skal vera meira upplýsandi og meira innbjóðandi. Adressan er www.fsvagar.fo

## Klaksvíkingar trívast væl í ÍF

ÍF hevur nú fýra fótbóltsspælarar úr Klaksvík í hópinum hjá sær. Málmaðurin Karstin Joensen er komin aftur til Fuglafjarðar at royna seg, og Arnold Joensen hevur eisini gjørt avtalu við ÍF. Afturat teimum eru tveir yngri KÍ-spælarar eisini farnir til ÍF at spæla. Julian Samuelsen hevur verið í ÍF í fleiri vikur, meðan Tórður Lervig nú eisini roynir seg í felagnum.

## FCK nærkast finaluni

Hálvfinalurnar í norðurlendsku fótbóltskappingini Royal League vórðu spældar í gjárkvøldið, og eftir fyrru dystirnar eru greiðar ábendingar um, at FC Keypmannahavn verður aftur í finaluni í ár. Í gjárkvøldið vann FCK 3-1 á FC Midtjyllandi. Úrslitið var tað sama, tá ið Lillestrøm úr Noreg og Djurgården úr Svøríki spældu – her var tað norska liðið sum vann.

## Start tapti

Hóskvøldið spældi Start venjingardyst ímóti Rosenborg, og dysturin endaði við, at Start tapti 2-0. Todi Jónsson var ikki við hjá Start, tí hann fekk ein minni vøddaskaða undir venjing mikudagin, og tí kundi hann ikki spæla. Roknað verður tó við, at Todi verður klárur aftur fyrsta dagin. Nú fer Start til Spania á venjingarlegu.